

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 04 - 2013

# Føroysk innrás í Grønlandi

Mánadagin fer eitt føroyskt ferðalag við sjálvum løgmanni á odda á vitjan i Grønlandi. Ikki færri enn 50 fólk eru við í ferðalagnum, sum fer at kunna seg við grønlendsk viðurskifti og bjóða seg fram til at gerast partur av vinnumenningini í Grønlandi. Tað er Vinnuhúsið og Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum stíla fyri hesum stóra og spennandi tiltakinum. Vit skulu leita mong ár aftur í tíðina, tá føroyingar so fjølmentir settu kós móti grannanum fyri norðan. Vitjanin kemur í kjalarvørrinum á veðurlagsbroytingunum í tí arktiska økinum og stóra altjóða áhuganum at gera íløgur í Grønlandi. Føroyingar, sum hava eina tradition fyri at vera partur av vinnuvirkseminum í Grønlandi, vilja eisini vera við, nú møguleikar aftur vísa seg. Talan er um umboð fyri bæði privatar fyritøkur og almennar myndugleikar í Føroyum, sum eru partur av tí føroyska ferðalagnum. Umframt løgmann eru eisini týðandi vinnulívsfólk, eitt nú ovasta leiðslan í BankNordik, stjórar og leiðsla í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri bert at nevna nøkur. Stórar fyritøkur, sum eru við, eru m.a. Mest, Articon, Atlantic Airways, Thor, Faroe Ship, SEV o.a. Nógv verður gjørt burtur úr vitjanini og fara føroyingarnir at vitja bæði almennar stovnar og privatar fyritøkur. Eitt nú fara føroyingar at fáa innlit í grønlendsku olju- og námsvinnurnar. Her fer grønlendska arbeiðsgevarafelagið at hava ein týðandi leiklut. Eisini fara føroysku umboðini at greiða frá eitt nú føroysku oljumenningini og hvussu henda hevur verið við til at skapa arbeiðspláss og inntøkur til samfelagið. Marita Rasmussen og Magne Arge fara at greiða frá hesi spennandi gongdini í føroyska samfelagnum. Eisini verður kunnað um føroysku royndirnar innan lóggávu og stig til at fáa útlendingar at gera íløgur í Føroyum.